Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.01.2014 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245

Møttir limir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur Protokollførari: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit

Til viðgerðar

1/14	13/01052	Umboð kommununnar til upptøkunevnd – Kunngerð um Røktarheim og Sambýlir
2/14	13/01102	Ungdómsting í Klaksvíkar Kommunu – Jóhann Lützen, býráðslimur
3/14	14/00026	Broyting av ásetingum fyri øki A10
4/14	13/01110	Umvæling av tekjunum á KÍ- og Badmintonhallunum - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Til viðgerðar

1/14
13/01052 Umboð kommununnar til upptøkunevnd – kunngerð um røktarheim og sambýlir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir"	14.01.2014	1/14	
2 Klaksvíkar Býráð	23.01.2014	1/14	

Frágreiðing um málið:
Í *kunngerð nr. 99 um røktarheim og sambýlir* er áseting um upptøkunevnd, har fýra umboð kunnu verða tilnevnd av kommununum í upptøkuøkinum í felag.

Á fundinum hjá TrN E&B 3. desember 2013 varð nevndin kunnað um, at Klaksvíkar Kommuna hevði sent uppskot um samstarvsavtalu innan eldraøkið til hinar kommunurnar í Norðoyggjum, sum tó ikki var undirskrivað, og tí skuldi val av umboðum til upptøkunevnd útsetast til fundarumfarið í januar 2014.

Í mun til ætlaðu samstarvsavtaluna er støðan tann, at Klaksvíkar Kommuna onga afturmelding hevur fingið frá smærru kommununum, sum vísir, at tær eru sinnaðar at innganga eina samstarvsavtalu innan eldraøkið.

Sambært § 3 Stk. 6. hevur Almannaverkið ábyrgd av at skipa upptøkunevndina.
Í hesum sama tíðarskeiði hevur økisleiðarin fyri Norðoyggjar rykt Klaksvíkar Kommunu eftir eini avgerð, so tey kunnu innkalla til fund í upptøkunevndini. Mett verður tí, at val av umboðum til upptøkunevnd ikki kann bíða longur, og tí mælir umsitingin til at tilnevningin verður so fakliga breið sum gjørligt, og at umboðini í mest møguligan mun eru vanlig starvsfólk innan eldraøkið, tí leiðararnir longu frammanundan er væl umboðaðir í upptøkunevndini.

Sum vegleiðing til val av umboðum við fakligari útbúgving, hevur umsitingin hetta uppskot til útveljingina:

- **Eitt starvsfólk frá Heimatænastuni**
  **Hesi hava sína gongd hjá heimabúgvandi úti í økinum og kunnu tí væntast at hava kunnleika til tørv*
- **Eitt starvsfólk frá Økispsykiatriini**
  **Hesi hava sína gongd heima hjá teimum, sum hava sálarligt órógv. Talan er ofta um einsamøll fólk, sum vegna sína sjúku ikki megna at tala sína egnu søk, og harumframt ger sjúkan, at tey ofta eru uttan familjunetverk.*
- **Eitt starvsfólk frá "dagtilboð til eldri"**
  ****starvfólk í t.d. Búðatrøð hava dagligt samband við tey, sum eru heimabúgvandi og eru í byrjunarstøði til demens og teirra avvarðandi. Tey eygleiða gongdina og vit,a nær tørvur er á meiri enn einum dagtilboð.***
- **Eitt starvsfólk frá røktarheimi ella eldrasambýli**

Mælt verður til, at TrN E&B umrøður málið, og síðan beinir málið í býráðið, ið sambært galdandi mannagongdum velur eitt umboð og eitt varaumboð fyri hvønn av omanfyri nevndu fakbólkum, sum uppskotið frá umsitingini leggur upp til.

Lógargrundarlag:
Kunngerð nr. 99 frá 5. juli 2013 um røktarheim og sambýli

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Kunngerð nr. 122 um broyting í kunngerð um røktarheim og sambýli frá 29. oktober 2013

Orðingin í kunngerðini, sum snýr seg um upptøkunevnd er hendan:

2. § 9, stk. 2 og 3 verða orðaði soleiðis:
"Stk. 2. Í upptøkunevndina verða hesi vald fyri 4 ár:
1) Avvarðandi økisleiðari í Almannaverkinum.
2) Visitator í økinum.
3) Røktarheimsleiðarar í økinum.
4) Upp til fýra umboð kunnu verða tilnevnd av kommununum í upptøkuøkinum í felag. Umboðini skulu hava røktarfakliga ella aðra hóskandi útbúgving. Eisini kunnu umboðini hava drúgvar starvsroyndir á eldraøkinum.
Stk. 3. Økisleiðarin er formaður í upptøkunevndini. Upptøkunevndin útnevnir næstformann. Almannaverkið veitir skrivara til upptøkunevndina. Skrivarin hevur ikki atkvøðurætt

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar. Hetta út frá tí fortreyt, at samsýning til limir, sum kommunan hevur valt í nevndir og stýri, sum arbeiða fyri aðrar myndugleikar, higartil hevur verið goldin av viðkomandi myndugleika.

Tilmæli:
Mælt verður til, at býráðið velur eitt umboð og eitt varaumboð fyri hvønn av nevndu fakbólkum til *Upptøkunevnd til røktarheim og sambýli*, sum hava røktarfakliga ella aðra hóskandi útbúgving, soleiðis sum uppskotið frá umsitingini leggur upp til.

Samtyktir:
TrN E&B 14-01-2014: Nevndin tekur undir við at velja umboð fyri hvønn av nevndu fakbólkum sambært tilmælinum frá umsitingini, og at tey sita til ársenda í 2014, tá tann endaligi eldrapakkin fyriliggur.

BýR 23-01-2014: Tilmælið frá TrN E&B, dagfest 14-01-2014 samtykt. Býráðið heitir á umsitingina um at velja limir í nevndina skjótast gjørligt.

2/14
13/01102 Ungdómsting í Klaksvíkar Kommunu – Jóhann Lützen, býráðslimur

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	14.01.2014	2/14	
2 Fíggjarnevndin	21.01.2014	5/14	
3 Klaksvíkar Býráð	23.01.2014	2/14	

Frágreiðing um málið:
Jóhann Lutzen, formaður í TRN B&U, hevur sum kunnugt gjørt uppskot til ungdómsting. Endamálið við einum ungdómstingi er at kveikja og menna áhuga teirra ungu fyri fólkaræðinum. Ætlanin er at seta á stovn ungdómsting í Klaksvíkar Kommunu. Málbólkurin fyri ungdómstingið skal vera fyri aldursbólkin 8., 9. og 10. flokk, og er málbólkurin sostatt á hesum støðum:

a. Fólkaskúlin
b. Tónlistaskúlin
c. Húsið

Undirritaða fer at kalla saman til ein fyrsta sparrings-, hugskots- og skipanarfund, og hevur Løgtingið royndir á økinum, og fara vit eisini at venda okkum til teirra at fáa evt. tilfar frá teimum.

Vit hava gjørt okkum tankar um, at umboðanin til ungdómstingið møguliga kann veljast nakað soleiðis:

a. Ziskatrøð: 3 umboð (ella 4?)
b. Ósáskúlin: 3 umboð (ella 4?)
c. Húsið: 2 umboð (ella 1?)
d. Tónlistaskúlin: 2 umboð (ella 1?)

Og at ungdómstingið møguliga kann verða skipað nakað soleiðis:

a. Samanlagt: 10 umboð +borgarstjórin, sum leiðir býráðsfundin hjá ungdómstinginum
b. Kanska velja tvær nevndir á 5 umboð í hvørjari
c. Talan er um ein dag, har hetta virksemið fer fram
d. Møguliga endurtakast árliga ella annað hvørt ár

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Enn er ikki greitt um ella hvat kostnaðurin verður av einum ungdómstingi, men tá vit koma hesum spurninginum nærri, verður málið lagt fyri nevnd aftur.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum um at seta á stovn eitt ungdómsting í Klaksvíkar Kommunu, og at omanfyrinevndi leistur verður fylgdur.

Samtyktir:
TRN B&U 14-01-2014: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 09.01.14. Ósáskúlin, Ziskatrøð og Húsið verða umboðað í ungdómstinginum.

FíN 21-01-2014: Nevndin tekur undir við TrN B&U 14-01-2014.

BýR 23-01-2014: Tilmælið frá TrN B&U, dagfest 14-01-2014, einmælt samtykt tó við teirri broyting, at tiltakið heldur skal kallast *Ungdómsbýráð.*

3/14
14/000026 Broyting av ásetingum fyri øki A10

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.01.2014	1/14	
2 Klaksvíkar Býráð	23.01.2014	3/14	

Frágreiðing um málið:
Í sambandi við ætlanir at byggja íbúðir á matr. nr. 1463, ið er 1215 m^2 til støddar, hava vit hugt eftir ásetingunum fyri økið. Galdandi fyri A10-økið er, at grundstykkjavíddin skal í minsta lagi vera 200 m^2 fyri samanbyd hús og íbúðir, og er tí møguligt at byggja 6 íbúðir á grundøkinum.

Tá ið økisásetingarnar blivu gjørdar fyri økið, vóru tankarnir, at tað skuldi vera møguligt at byggja meira á minni stykkir, men tó skulu avstandir til mark/veg og parkeringsviðurskiftir vera í lagi.

Lógargrundarlag:
Økisásetingar fyri A10

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at broyta økiásetingar fyri A10 økið soleiðis, at grundøkjavíddin fyri hvørja íbúð skal vera í minsta lagi 150 m^2 í mun til nú galdandi 200m^2.
Hendan broytingin gevur eisini møguleika, at eini sethús kunnu byggjast á einum grundøki uppá 300 m^2 við til dømis 2 eigaraíbúðum.
Eisini mæla vit til, at allar økisásetingar verða endurskoðar sambært *Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um Býarskipanir og Byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013,* um at góðkendar byggisamtyktir skulu endurskoðast og sendast landsstýrismanninum til staðfestingar fimta hvørt ár. (Okkara varð endurskoðað í 2008.)

Samtyktir:
UBN 13-01-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagf. 09.01.2014.

BýR 23-01-2014: Tilmælið frá UBN, dagfest 13-01-2014 samtykt.

4/14
13/01110 Umvæling av tekjunum á KÍ- og Badmintonhallunum - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.01.2014	3/14	
2 Mentanarnevndin	14.01.2014	1/14	
3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	14.01.2014	3/14	
4 Fíggjarnevndin	21.01.2014	2/14	
5 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	23.01.2014	4/14	
6 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	20.02.2014		

Frágreiðing um málið:
Eftir ringa veðrið í heyst/vetur er støðan í hallunum nú so ring, at trupult er at avgreiða venjingar og kappingar annars í hallunum. Serliga í Badmintonhøllini hava verið sera ringar umstøður orsakað av lekum. Tekjan er í sera ringum standi, og ivasamt er, hvussu leingi avvarðandi sersambond góðtaka umstøðurnar til avgreiðslu av dystum og kappingum. Metingar siga, at tørvur er á at skifta tekjuna í Badmintonhøllini ella í minsta lagi at gera munandi umvæling.

Borgarstjórin hevur í samstarvi við avvarðandi nevndarformenn sett arbeiðið í gongd (*Sí annars hjáløgdu notat frá ávikavist 18. og 19. desember 2013*)

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Av játtanini til «Íløga til nýggjan skúla» í 2013 er 1 mió. kr. eftir, og verður hetta at flyta til umvælingararbeiðið av tekjunum á hallunum, samstundis sum býráðið longu hevur játtað 1 mió kr. til

endamálið í 2014. Saman við einum møguligum tryggingargjaldi er við hesum góðar 2 mió. kr. til endamálið.

Tilmæli:

1 mió. kr. verður flutt frá «Íløga til nýggjan skúla í 2013» til «íløga Badminton-/KÍ-høllin 2014». Slíkt mál skal leggjast fyri nevndir og býráð og skal samtykkjast tvær ferðir, av tí at hetta er flyting millum kontur.

Samtyktir:

UBN 13-01-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 07-01-2014

MeN: 14-01-2014: Nevndin tekur undir við UBN 9. januar 2014

TRN B&U 14-01-2014: Nevndin samtykti, at taka undir við UBN 13.01.14

FíN 21-01-2014: Nevndin tekur undir við UBN 13-01-2014, MeN 14-01-2014 og TrN B&U 14-01-2014.

BýR 23-01-2014: Tilmælini frá UBN 13-01-2014, MeN 14-01-2014, TrN B&U 14-01-2014 og FíN 21-01-2014 samtykt.

Fundurin lokin kl. 20:00

_____
Jógvan Skorheim

_____
Steinbjørn O. Jacobsen

_____
Gunvá við Keldu

_____
Óluva Klettskarð

_____
Jóhann Lützen

_____
Kristian Eli Zachariasen

_____
Signhild V. Johannesen

_____
Eyðstein Ó. Poulsen

_____
Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur

_____
Atli S. Justinussen

_____
Herfrí J. Sørensen